

www.oljan.fo

**Jan Müller** 07 - 06 - 2013

# Stórur gravgangur at sleppa við Stril Krúnborg

Nú tað gongur stútt framá við byggingini av nýggja frálandaskipinum hjá Krúnborg reiðaríinun í Havn, er eisini stórur gravgangur eftir at fáa tjans við nýggja skipinum, tá tað fer í drift næsta ár. Petur Jacobsen, stjóri sigur við oljan.fo, at eftir ætlan verður skrokkurin klárur at sleipa upp til Flekkefjord í Norra úr Polen síðst í oktober 2013, har skipið verður útgjørt liðugt og avleverað hálvan mei 2014. Áhugin fyri at mynstra við Stril Krúnborg er stórur. Vit hava fingið nógvar umbønir frá bæði væl skikkaðum fólki og eisini ungum fólki, sum vilja byrja sína lívsleið innan offshore. Tað kann eisini nevnast, at føroyingar, sum sigla úti í verð innan sokallaða subsea* økið, eru fegnir um, at eitt føroyskt reiðarí nú eisini brynjar seg út saman við norska felagnum Møkster innan júst hetta økið, sigur Petur Jacobsen. Hann vísir á, fyri framman liggja enn einaferð nýggjar avbjóðingar fyri P/F Krúnborg, og avbjóðingar hava tað verið nógvar av, síðani felagið varð sett á stovn í 1964. Komandi ár, tá Stril Krúnborg fer av bakkastokki, eru júst 50 ár liðin, síðani felagið fyrstu ferð sá dagsins ljós, tá fyrsta skipið hjá felagnum, Ísborg, fór av bakkastokki inni á Skála. Sáttmálin um byggingina av hesum fyrsta frálandaskipinum hjá Krúnborg varð gjørdur í november í fjør. Myndirnar eru frá byggingini av skrokkinum á pólskari skipasmiðju. Og frá oljuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum, har umboð fyri Krúnborg eisin vóru at síggja.